# TAÐ HENDIR ...

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

## NORÐOYASTEVNA Í KLAKSVÍK

Norðoyastevnan í ár er fyri børn og barnsligar sálir, sum tey siga. Nýggj fólk eru komin við í arbeiðið at fyriskipa Norðoyastevnuna, og tey ætla, at stevnan skal úr rundkoyringini og út á høvuðsvegin. Tiltøk av øllum hugsandi slagi verða alt vikuskiftið í Klaksvík.

**NORÐOYASTEVNAN**
Fríggjadagur 4/6-Sunnudagur 6/6



## RANNVÁ SÝNIR VERK FRAM

Bæði í málningum og í steinprentum hevur Rannva Kunoy eksperimenterað við sera ymiskum stílsløgum, men seinastu tvey árini hava myndir hennara verið merktar av einum sermerktum, minimalum stíli í myndum. Á ársins summarframsýning í Norðurlandahúsinum fáa fólk høvið at uppliva bæði spildurnýggjar málningar hjá Rannvu Kunoy og hennara steinprentsrøð FRONTAL, eins og eitt størri katalog verður framleitt til framsýningina við myndum og tekstum.

**SUMMMARFRAMSÝNING**
Rannvá Kunoy
Norðurlandahúsið frá 4/6 kl. 17.00



## PÍNLIG MANNFÓLK

Danny Wallace er mannfólk, og tað heldur hann er trupult at verða í hesum døgum. Í bókini greiðir hann frá pínligum løtum sum maður. Tá hann kemur at siga okkurt skeivt um eitt barn hjá einum vini, av óvart kemur at ganga aftaná einari kvinnu um kvøldið, og tá hann rennur undan sínum gamla frisøri. Danny Wallace hevur skrivað bókina Yes Man, sum varð gjørd til spælifilm við Jim Carrey. Hendan bókin er stuttlig – og til tíðir pínlig.

**DANNY WALLACE**
Awkward Situations for Men
Ebury Press



## UPPHITINGTIL HM

HM-endaspælið í fótbólti nærkast í hvørjum, og í hesum døgum fyrireika landsliðini seg til stóru kappingina. Onkrir venjingardystir eru á skránni, og leygardagin ber til at síggja Danmark spæla seinasta venjingardystin áðrenn HM-kappingina. Hann er ímóti vertunum fyri kappingini, Suðurafrika.

**SUÐURAFRIKA-DANMARK**
Venjingardystur í fótbólti
Leygardagin 5/6
kl. 14.30



## FJARÐAFESTIVALUR

Hetta vikuskiftið er gospelfestivalur í Skálafirði. Árligi Fjarðafestivalurin verður hildin hesa vikuna. Fyrstu tiltøkini vóru longu mánadagin, men festivalurin verður í hæddini um vikuskiftið. Í kvøld spælir millum annað kendi amerikanski gittarspælarin Brian Head Welch. Nógv og fjølbroytt gospelnøvn eru annars at hoyra á festivalinum.

**FJARÐAFESTIVALURIN**
Keldan í Skálafirði
31. mai-6. juni



## MEIRA SEX AND THE CITY

Nú er nýggi filmurin við kvinnunum í Sex and the City at síggja í biohøllunum kring heimin. Filmurin varð frumsýndur í Havnar Bio í gjárkvøldið. Hetta er annar spælifilmurin í røðini um Carrie og vinkonurnar, sum uppliva mangt og hvat saman og hvør sær.

**SEX AND THE CITY 2**
Havnar Bio
Frá 3/6-



## ÓGLOYMANDI DAGURIN HJÁ DØNUM

26. Juni í 1992 er ein søguligur dagur hjá dønum. Danir skulu spæla EM-finalu í fótbólti ímóti Týsklandi. Uttanríkisráðharrin Uffe Elleman Jensen fer á fund í Lissabon. Ein flogskipari fyrireikar eina óvanliga móttøku, um danir vinna EM, og ein eykaspælari fyrireikari seg til sín lívsdyst. Dokumentar um minniliga dagin, sum Jakob Thygesen ehvur gjørt.

**24 TIMER VI ALDRIG GLEMMER**
DR2 leygarkvøldið 5/6 kl. 19.00